# Eykafundur um sløkkiliðsmálið

**Eftirlitið við bilunum hjá Klaksvíkar sløkkiliði verður nú tikið upp av brunanevndini hjá Klaksvíkar býráð**




SLØKKILIÐ
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað er brunanevndin, sum varðar av sløkkiliðnum, og í fyrstu atløgu var málið um bilarnar, sum ikki startaðu næstseinasta sunnukvøld, fyri á fundi í nevndini mánadagin.
Steinbjørn Jacobsen, formaður í brunanevndini, sigur, at á fundinum varð bert kunnað um málið, tí mett varð ikki, at nóg nógvir upplýsingar vóru, til at málið kundi viðgerast gjølla. Formaðurin hevur tí biðið um frágreiðingar frá øllum pørtum í málinum og fer nú at kalla inn til eyka fund í brunanevndini seinni í vikuni.

**Ymsar frágreiðingar**
Ein av teimum, sum formaðurin hevur biðið um frágreiðing frá, er varasløkkiliðsleiðarin. Í grein í blaðnum í farnu viku kom fram, at frágreiðingarnar hjá sløkkiliðsleiðaranum og varaleiðaranum um tilburðin næstseinasta sunnukvøld eru sera ymiskar. Sambært sløkkiliðsleiðaranum var tað bert tann eini manningarbilurin, sum sjáldan verður brúktur, ið ikki startaði. Leiðarin vísti samstundis á, at eftirlitið við bilunum hjá Klaksvíkar sløkkiliði er sera gott.
Men sambært varaleiðaranum vóru tað bæði manningarbilurin og ein av stóru sløkkiliðsbilunum, sum ikki startaðu. Hetta váttaði ein annar av sløkkiliðsmonnunum eisini. Varaleiðarin vísti eisini á, at froskmenn vanliga brúka manningarbilin, og legði afturat, at onki skipað eftirlit er við bilum og útgerð hjá Klaksvíkar sløkkiliði.
Blaðið hevur nú biðið um innlit í frágreiðingina, sum sløkkiliðsleiðarin hevur givið brunanevndini um tilburðin næstseinasta sunnukvøld.

## Børnini upp á gólv

**Aftur í vetur verður skipað fyri føroyskum barnadansi í Norðurlandahúsinum**

FØROYSKUR DANSUR

Í vetur verður aftur skipað fyri føroyskum barnadansi í Norðurlandahúsinum. Hetta er tveyogtjúgunda árið á rað, og harvið er hetta tiltak eitt tað drúgvasta tiltakið í søgu húsins. Byrjað verður fríggjakvøldið 7. oktober 2005 kl. 20.00
– Endamálið við hesum tiltaki er at læra børnini kvæðaskap okkara og harvið kveikja teirra áhuga og varðveita kvæðini sum ein livandi part av mentan okkara, sigur verður sagt úr Norðurlandahúsinum.
Tað er Dansifelagið í Havn og Norðurlandahúsið, sum øll tjúgu árini hava skipað fyri barnadansinum í dansistovuni í Norðurlandahúsinum.
Dansað verður friggjakvøld kl. 20.00-21.00, og vóna fyrireikararnir, at nógv børn og foreldur møta fjølment.

# Fogh: Høgni førir eina teoretiska diskussión

**Danir vilja hjálpa londum í miðeystri til frælsi og fólkaræði, men ikki føroyingum, sigur Høgni Hoydal. Fogh sigur, at Høgni tosar í teori og ikki um praksis**



CHRISTIANSBORG
*Marjun Dalsgaard*

Í salinum sá Høgni Hoydal út sum hann hevði ringt við at halda sær ikki at flenna, tá Anders Fogh nevndi positivu gongdina í ríkisfelagsskapinum í røðu síni, tá fólkatingið kom saman fyrstu ferð eftir summarsteðgin. »Rigsfælleskabet er inde i et særdeles positivt forløb. En proces, hvor det færøske og det grønlandske folk i stadig højere grad får ansvaret for at udvikle deres samfund.«



**Fogh sigur ósatt**
– Anders Fogh sigur beinleiðis ósatt, tá hann sigur, at føroyingar hava fingið størri sjálvræði, og í heila tikið pyntar hann uppá veruleikan, sigur hann og leggur aftrat, at røðan hjá Anders Fogh Rasmussen var vánalig, ómetaliga keðilig, ósonn og eitt typiskt dømi um, at danska stjórnin førir viskileðurpolitikk har alt, sum ikki sær so pent út, bara verður viskað burtur.
– Eg haldi, at tað er áhugavert, at Fogh í røðu síni sigur, at Danmark skal tryggja fólkaræði í heiminum, tá føroyingar ikki kunnu fáa tað, sigur Høgni Hoydal á peikar á sína útskrift av røðuni, har hann hevur strikað undir setningin: »Mennesker i alle lande har krav på frihed og demokrati«.
Hava føroyingar ikki fólkaræði?
Nei – vit hava ikki fult fólkaræði. Tá ið vit kunnu uppliva at løgtingið samtykkir mál í løgtinginum og danska stjórnin løggevir ímóti tí, kanst tú ikki siga, at vit hava fult fólkaræði sigur Høgni Hoydal og sipar til at hernaðarløggávan varð sett í gildi í Føroyum, hóast løgtingið var ímóti tí.

**Løgmaður vælnøgdur**
Løgmaður var hinvegin vælnøgdur við røðuna.
– Júst sum forsætismálaráðharrin segði í røðuni, hava vit júst roynt heimildarlógina í sambandi við avtalu við Ísland, har eg undirskrivaði ein part tann 2. september, sum eg ikki hevði kunnað gjørt áðrenn uttan at drigi donsku myndugleikarnir inn, sigur Jóannes Ejdesgaard. Hann heldur, at trupulleikin hjá Høgna er, at hann er í móti heimildarlógini av prinsipiellum orsøkum, og at hann tískil ikki vil góðtaka, at hon er hent.
– Alt er sum tað skal vera leggur hann aftrat at enda.



**Fogh: Høgni er sera teoretiskur**
Hatta er ein teoretisk diskusión, sum Høgni Hoydal førir fram, sigur Anders Fogh Rasmussen. Í veruleikanum – í praksis gevur heimildarlógin føroyingum størri sjálvræði.
– Eg kenni jú Høgna Hoydal og eg veit, at hann førir eina sera teoretisk diskussión á hesum umráðnum, sigur Anders Fogh Rasmussen, tá hann varð spurdur um eina viðmerking.
Eg vil gjarna leggja aftrat, at tað er mín sannføring og hendan stjórnin arbeiðir eftir, at tað er heilt og fult upp til føroyingar sjálvar um teir vilja hava fult ræði á landinum. Í sambandi við um føroyingar hava fólaræði, vil eg siga, at eg veit, at Høgni Hoydal førir eitt krígg móti ríkisfelagsskapinum og ikki sær Føroyar sum frælst, meg eg haldi at føroyingar hava fólkaræði og eg trúgvi at flestu føroyingar eru samdir við mær.